# LEIĐARAROFILUR

## Deildarleiðari fyri Sýnsdeildini

Mai 2023

**INNIHALD**

INNGANGUR ..... 3

STARVIÐ SUM DEILDARLEIÐARI ..... 3

FØRLEIKAKRØV TIL DEILDARLEIÐARAN ..... 4

LØN OG SETAN ..... 5

UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR ..... 5

SETANARTILGONGDIN ..... 5

TÁ STARVIÐ ER SETT ..... 5

**INNGANGUR**
Sjóvinnustýrið skal hava nýggjan deildarleiðara fyri Sýnsdeildina, og talan er um eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum er leyst at søkja.

Í hesum sambandi hevur Sjóvinnustýrið gjørt eina styttri miðlalýsing um starvið, og eisini hendan leiðaraprofilin, sum er ein nærri lýsing um, hvat starvið inniber, og hvørjar væntanir Sjóvinnustýrið hevur um førleikar og royndir hjá umsøkjarum til starvið. Leiðaraprofilurin verður nýttur sum grundarlag undir viðgerðini av umsóknum, og endamálið við leiðaraprofilinum er, at væntanir hjá Sjóvinnustýrinum og umsøkjarum hóska so væl saman sum til ber. Harumframt leggur Sjóvinnustýrið dent á, at umsøkjarar og Sjóvinnustýrið hava felags fatan um starvið, soleiðis at setanin kemur at eydnast.

**STARVIÐ SUM DEILDARLEIÐARI**
Yvirskipaða ábyrgdin hjá Sjóvinnustýrinum er at verja mannalív og umhvørvið á sjónum og at tryggja, at øll føroysk skip kunnu sigla trygt í allar heimsins havnir. Høvuðsuppgávurnar a Sýnsdeildini eru sýn av skipum og bátum, løggilding av klassafeløgum og undirveitarum, innflagging, vanlukkur á sjónum o.a. Sjóvinnustýrið hevur ábyrgdina av føroyska regluverkinum, sum ásetur krøv til skip og bátar, sum eru skrásettir í føroysku báta- og skipaskrásetingunum. Føroyska regluverkið fevnir um altjóða krøv, umframt serlig føroysk krøv. Stovnurin leggur áherðslu á at fylgja við í broytingunum í altjóða krøvum, og at seta hesi í verk í samsvari við føroyska regluverkið.

**Týdningarmiklastu uppgávurnar hjá deildarleiðaranum eru at:**

- tryggja, at øll arbeiði verða framd innan ásettar karmar á einum høgum fakligum stigi
- tryggja at avgerðir verða tiknar sambært galdandi regluverki hjá IMO og ES
- skapa skilagott samstarv og veita dygdargóða viðgerð og tænastu
- hava dagligu leiðsluna av starvsfólkum og øllum virksemi á Sýnsdeildini
- fremja neyðugar raðfestingar í mun til starvsfólkaorkuna á Sýnsdeildini
- leiða, fordeila og samskipa arbeiðið a Sýnsdeildini soleiðis, at hetta verður framt so effektivt sum til ber
- tryggja skilagott samstarv og samskifti við øll onnur øki í Sjóvinnustýrinum, eins og við kundar og aðrar áhugabólkar
- planleggja, seta í gongd, fylgja við og fylgja upp í mun til tvørgangandi uppgávur og samlaða virksemið í Sjóvinnustýrinum annars.
- savna leiðslu og starvsfólk í mun til felags avbjóðingar og harvið tryggja best møgulig úrslit
- at veita bestu møguligu tænstuna til kundar, aðrar áhugabólkar og eisini innanhýsis í Sjóvinnustýrinum

**FØRLEIKAKRØV TIL DEILDARLEIÐARAN**
Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum.

Fakligir førleikar

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. innan verkfrøði ella útbúgving sum maskinmeistari ella skipsførari saman við viðkomandi royndum og eftirútbúgvingum
- Leiðsluútbúgving og/ella leiðsluroyndir frá líknandi starvi
- Kunnleika til og/ella royndir innan arbeiði við regluverkinum hjá IMO og ES
- Kunnleika til almenna fyrisiting og fyrisitingarliga handverkið
- Góðan kunnleika at planleggja og stýra virksemi, sum er er á høgum tekniskum stigi, og sum til tíðir kann vera serliga avbjóðandi og sveiggjandi
- Royndir og góðan kunnleika til verkætlanarstýring
- Gott skil fyri KT og ert sinnað/ur at taka við nýggjari vitan innan KT
- Dugir væl at samskifta og málbera teg á føroyskum, donskum og enskum í skrift og talu

Leiðsluførleikar

Ynskiligt er at deildarleiðarin hevur flest allar av hesum eginleikum. Væntað verður at tú:

- ert ein sterkur og loyalur leiðari við góðum evni til at leiða
- ert ein liðleiðari við góðum samstarvsevnum, sum støðugt mennir liðavrikini
- ert ein góður ráðgevi hjá stjóranum og leiðslubólkinum og fremur avgerðirnar sum verða tiknar í verki
- ert treyst/ur og letur teg ikki lættliga taka av fótum
- megnar at leiða, tingast og samstarva við náttúrligum myndugleika
- ert ein opin og samskiftandi leiðari, sum hevur virðing fyri ymiskum sjónarmiðum
- leggur dent á at taka starvsfólkini við í málsviðgerð og týðandi avgerðir
- dugir væl at lurta og at eggja til nýhugsan

Persónligir førleikar

Deildarleiðarin hevur í yrkinum nógv samskifti og samtarv við onnur, og tí eru persónligu eginleikarnir týdningarmiklir. Væntað verður, at tú:

- ert búgvin, og dámar væl at samstarva og samskifta við kundar, starvsfólk og aðrar áhugabólkar
- er virkisfús/ur og er týðiliga áhugað/ur
- dámar at síggja úrslit í mun til tey mál sum verða sett
- ert jalig/ur og siðilig/ur og vísir øðrum álit og virðing
- ert sterk/ur og hevur ró og yvirlit, eisini tá ið støðan gerst torfør, ella tá ið arbeitt verður undir trýsti
- hevur góð samráðingarevni
- virðir tað at finna røttu loysnina grundað á nágreiniligar fyrireikingar
- ert ein persónur, sum regluliga eftirmetir úrslitini og metir um, hvørt tingini kunnu gerast betri, smartari, skjótari o.a.

**LØN OG SETAN**

Miðað verður eftir at starvið kann verða sett frá 1. september 2023, ella eftir nærri avtalu. Starvið verður lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at verða eitt tænastumannastarv. Harumframt verða 15% goldin í eftirlønargjaldi. Starvið kann eisini vera lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag. Í starvinum kann møguleiki vera fyri, at vera við í vaktarskipanini hjá Sóvinnustýrinum.

**UMSÓKN OG UPPLÝSINGAR**

Tú søkir starvið við at trýsta her.

**Umsóknir skulu verða Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 14. mai 2023.**

Áhugaðir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Hans Johannes á Brúgv, stjóra á 211323, ella við telduposti: hansj@fma.fo. Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Sjóvinnustýrinum: www.fma.fo.

**SETANARTILGONGDIN**

Tá umsóknarfreistin er farin, verður ein setanarbólkur settur at meta um umsøkjarar og at gera tilmæli um setanina. Setanartilgongdin verður skipað á tann hátt, at setanarbólkurin velur nakrar umsøkjarar til fyrstu samrøðu. Eftir fyrstu samrøðu verður mett um, hvørjir umsøkjarar skulu koma til aðru samrøðu. Teir umsøkjarar, ið koma til aðru samrøðu, skulu áðrenn samrøðuna taka eina test, har dentur verður lagdur á leiðslu. Úrslitini frá testini verða gjøgnumgingin saman við umsøkjaranum, áðrenn tey verða løgd fram fyri setanarbólkinum.

Tá setanarbólkurin er liðugur við sítt tilmæli, verður tilmælið viðgjørt av stjóranum, sum tekur avgerð um setanina.

**TÁ STARVIÐ ER SETT**

Eftir fimm mánaðar og eitt ár í starvi verða uppfylgjandi samrøður, sum fyrst og fremst eru ætlaðar at gera støðuna upp í mun til væntanir hjá báðum pørtum.